# ldskapinum



*Arnbjørn Ó. Dalsgarð: Vencil skal vera ein mótvekt til skaldsliga líkasælu ...*
*Oddfríður M. Rasmussen: Nettup - og geva fólki møguleika at velja okkurt ordiligt at lesa ...*




*Vencil fimti, perma: Bárður Jákupsson*

– Góður skaldskapur megnar at byggja upp ein heim í fleiri løgum á góðum skaldsligum máli. Tað vil samstundis siga, at hann skal bjóða lesararnum av við meir enn bara eini spennandi søgugongd, sigur Oddfríður.

Arnbjørn nikkar

– Skaldskapur er eitt amboð til at siga nakað, sum ikki kann sigast uppá nakran annan máta, og sum tískil annars ikki verður sagt. Hvat høvundurin velur at siga, má vera upp til hann sjálvan - eftir mínum tykki hevur hann fyrst og fremst eina skyldu mótvegis málinum, at brúka tað, so langt tað yvirhøvur røkkur og helst eitt sindur afturat, sigur Arbjørn og hyggur uppá Oddfríð, sum er komin í tankar um okkurt.

– Ein skaldsligur tekstur er í grundini tað øvuta av journalistikki ella einum lesarabrævi. Í journalistikki skalt tú siga tingini á einum konkretum og kendum máli. Skaldskapur brúkar eitt annað mál, sum gevur eina kenslu av, at okkurt meir goymir seg aftanfyri orðini, enn tað, tú sært, hugleiðir Oddfríður.

– Tí tori eg eisini at pástanda, at tú fært 100 ferðir meir burtur úr at lesa ein tekst hjá Tóroddi Poulsen enn eitt lesarabræv, skoytir Arnbjørn uppí.

– Tað hongur so aftur saman við, at í einum góðum teksti stendur okkurt altíð uppá spæl, sum fær lesaran at hugsa: Kann hetta lata seg gera? Uppgávan hjá høvundanum er so at prógva, at tað kann tað - bæði innihaldsliga og málsliga, staðfestir Oddfríður.

## Livir av vælvild

Hóast bert fáir dagar eru, síðani fimti Vencil kom út, eru ritstjórarnir longu í ferð við at fyrireika næstu útgávuna. Sum vant hava teir fingið tilfar sendandi í einum jøvnum streymi, og hugurin hjá teimum báðum at kjakast um, snøgga og koma við uppskotum til tekstirnar feilar onki. Ofta blíva kvøldini lang, og onkur høvundur blívur kanska firtin. Men tað er ikki tað, sum ger arbeiðið við Vencili strævið.

– Tað strævnasta er afturvendandi óvissan, um pengar nú eru til at geva næsta Vencil út. Hvørt ár søkja vit um somu pengar, men vit kunnu ongantíð verða vísir í, at peningurin verður játtaður, sigur Arnbjørn.

Teir báðir ritstjórarnir hava tí fleiri ferðir heitt á Mentamálaráðið um at fáa í lag eina skipan, har ein játtan verður oyramerkt til slík tíðarrit, eins og vanligt er aðrastaðni. Fyribils uttan úrslit. Tí liggur framtíðin hjá Vencili heldur ótrygg í hondini á vælvildini og skriftandi nevndum hjá avvarðandi mynduleikum.

# Permulist á Vencili

**Meðan skaldskaparlistin eigur innihaldið í Vencil, sleppur prentlistin framat á permuni.**

**Til hvørja nýggja útgávu av Vencil, hevur eitt listafólk verið á grafiska verkstaðnum og gjørt eitt prent til permu, sum onkursvegna er kveikt av innihaldinum.**

**Til nýggjasta Vencil var tað listamaðurin Bárður Jákupsson, ið fekk æruna at prýða permuna. Sermerkta bláa prentið er gjørt við íblástri úr kendu stuttsøguni "Ein steinkvinna" eftir ensku A.S. Byatt, sum Pauli Nielsen hevur týtt til Vencil fimta.**

**Smáu permulistaverkini fáast til keyps frá ritstjórini sum original og signerað steinprent uttan tekst prentaðan á.**




*Vencil fyrsti, perma Tóroddur Poulsen*




*Vencil annar, perma: Fríða Matras Brekku*




*Vencil triði, perma: Hansina Iversen*




*Vencil fjórði, perma: Ritstjórarnir*